lívdin
- í lívd hins hægsta

Februar 2009



# Familjan Lützen í farloyvi



*Ruth og Valdemar Lützen við synunum Anton og Markus*

Ruth og Valdemar Lützen, sum virka í donsku samkomuni Måløv Frikirke og aðrastaðni í Keypmannahavn, eru í Føroyum í farloyvi frá samkomuarbeiðinum í umleið eitt hálvt ár. Tey fara møguliga at fáa sær okkurt arbeiði, meðan tey eru her. Ruth hevur útbúgving sum pedagogur, og Valdemar er útbúgvin psykoterapeutur.

Vit í Lívdini ynskja teimum at vera vælkomin okkara ímillum. Ætlandi fara tey aftur til Danmarkar í august.

## Harrin er altíð við okkum

*Hava vit yvirgivið okkum til Harran, er hann altíð við okkum sum leiðari og hirði. Gevið gætur, at hann er hirði. Ein hirði leiðir seyð sín, bæði tá tað er bratt, og nógvir vandar lúra, og tá tað er slætt, og eingin vandi er. Hirðin er við alla tíðina. Soleiðis er Harrin Jesus. Hann er altíð við okkum. Í dag og í morgin, tá vit eru heima, í skúla ella til arbeiðis.*

*Tað kann vera, at tú ein av døgunum fert at ganga í brattlendi, og tú kennir, at vandar lúra, og hevur hug at gerast bangin. Minst tá til, at Harrin er við tær, hann sleppur tær ikki upp á fjall. Tað veit eg av royndum*, skrivar Corrie ten Boom í bókini "Helliggørelse – et fruktbart liv".

Corrie ten Boom gjørdist heimskend, eftir at fyrst bókin og síðan filmurin "Skjulestedet" komu út, har Corrie segði frá grípandi søguni, tá familjan ten Boom í Hálandi krógvaði jødar undir seinna heimsbardaga. Øll familjan varð tikin til fanga, og nasistastirnir tóku bæði pápan og systrina av døgum.



*Corrie ten Boom (1892-1983)*

Eftir seinna heimsbardaga ferðaðist Corrie kring heimin við boðskapinum um frelsu, fyrigeving og Guds kærleika. Hon fekk eisini høvi at fyrigeva onkrum av nasistisku vaktarmonnunum, sum ansaði eftir teimum í fongslinum.

Corrie ten Boom varð fødd 15. april 1892 og andaðist 15. april 1983, 91 ára gomul.

# Vinir í Lívdini

### Gunnvá í Nýsælandi

Mánadagin 5. januar fór Gunnvá Áargarð til Nýsælands at vera við í tiltakinum TEA, sum felagsskapurin OM (Operation Mobilisation) skipar fyri. TEA stendur fyri: Training, Evangelism og Adventure (venjing, evangelisering og upplivingar).

Hesar 10 vikurnar, sum tiltakið er, fara teir sjey luttakararnir at fáa undirvísing, ganga langar túrar við ryggsekki úti í fjøllunum og gista í smáttum og tjøldum. Harumframt skulu tey evangelisera millum tey, sum tey møta á túrunum.

Gunnvá kemur væntandi aftur til Føroya 24. mars.



Tað ber til at fylgja við tí, sum Gunnvá upplivir, á heimasíðuni http://teaprogramme.blogspot.com.

### Lív við í Jesus Revolution



Síðan í summar hevur Lív Mortensen verið við í felagsskapinum "Jesus Revolution" í Norra.

Lív er 20 ára gomul og er úr Hoyvík.

Fyrstu fýra mánaðirnar var mest skúlagongd, og nú í nýggja árinum verður farið runt í Europa við gleðiboðskapinum. Slagorðið hjá felagsskapinum í ár er: "Evangeliið til ungdómin í heiminum".

Umframt at vera dansari er Lív Mortensen miðlaábyrgdarfólk hjá Jesus Revolution. Hon hevur starvsroyndir á hesum øki, við tað at hon hevur arbeitt hjá SVF, har hon var knýtt at ítróttarsendingini 3-2 og var framleiðsluhjálparfólk hjá sjónvarpinum í ymsum sendingum.

Les meira um felagsskapin á http://www.jesusrevolution.no

## Lívdin til Zarepta




Vikuskiftið 13.-15. mars 2009 skipar Lívdin fyri samkomulegu á Zarepta.

Meira upplýsingar um leguna á heimasíðuni.

## Tillukku við barninum



9. januar 2009 fingu Laila Rajani Færø og Oluf Færø í Hoyvík eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4.300 gr.

19. januar fingu Jóhanna og Bogi Andreasen í Havn ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3.525 gr.

## Lærisveinaskeið á Zarepta

Felagsskapurin NTM Føroyar skipar í døgunum 20. til 24. mai 2009 fyri lærisveinaskeiði í Zarepta.

Thom Cunningham fer at hava skeiðið, sum verður á enskum. Tilmelding er á Zarepta frá 1. apríl.

Thom Cunningham og konan Carolyn vóru í 23 ár trúboðarar í Eysturríki, Onglandi og Skotlandi, til tey í 1997 gjørdust umboð fyri NTM í Stórabretlandi.

Síðani 2006 hava tey undirvíst í lærisveinaskeiðinum "Each One REACH One, Each One TEACH One".

Thom Cunningham hevur undirvíst fleiri av føroyingunum, sum hava gingið á bíbliuskúla hjá NTM í North Cotes.

*Kelda: www.ebenezer.fo*

**Heimasíðan hjá ungdóminum**

Ungdómurin í Lívdini hevur sína egnu heimasíðu, sum er:

**www.ung.livdin.fo**

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing og bøn eru týskvøld kl. 20.**

3. feb. Húsbólkar
10. feb. Kunning um byggiætlan (leiðslan)
17. feb. Prát um, hvat vit lærdu av taluni sunnudagin, og bønarløta
24. feb. Húsbólkar

## Mammubólkur á Brekku



Annanhvønn fríggjadag kl.10.30 savnast mammubólkur í hølunum hjá Lívdini á Brekku 3 í Hoyvík. Mammubólkurin savnast fríggjadag í líka viku, t.v.s. viku 42, 44, 46 o.s.fr. Allar mammur við smáum børnum eru vælkomnar.

Er okkurt at spyrja um, eru tit vælkomnar at ringja til Súsonnu Joensen á tel. 319899.

## Bønarløtur á Brekku



Skipað verður fyri bønarløtum í hølunum á Brekku hvønn mánadag kl. 08.10, hvønn týsdag kl. 16.10 og hvønn fríggjadag kl. 12.10. Haraftrat er ein bønarløta hvønn sunnumorgun kl. 10.10 í Hoyvíkar skúla.

Á bønarløtunum á Brekku verður umframt at biðja eisini gingið gjøgnum bønirnar í Sálmunum. Tað eru Jógvan Zachariassen og Poul Guttesen, sum skipa fyri.

## Sáttmálar um bygningin

Á verjafundi 12. januar 2009 vórðu ráðgevarasáttmálar viðvíkjandi bygninginum hjá Lívdini undirskrivaðir. Sáttmálarnir fevna um arkitekta- og verkfrøðingaráðgeving í sambandi við betongarbeiðstøkuna, sum umfatar fundament, lendisgólv, veggir, skiladekk og takdekk.

Sambært tíðarætlanini skal verkætlanin verða klár til útbjóðingar í apríl mánaði 2009. Boðið verður út, tá trygd er fingin fyri nøktandi fígging.



*Sáttmálar verða undirskivaðir. Vinstrumegin frá.: Ólavur Jøkladal, Jákup Jacobsen, Johan Syderbø, Leivur F. Guttesen og Árni Jakobsen*

## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 1. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Bøn*
*Talari: Odd Færø*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið (yvirlit)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*




### Sunnudagin 8. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Kvinnur í Bíbliuni*
*Talari: Lív Clementsen*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Visiónir (Nehemias)*
*Talarar: Leiðslan*




### Sunnudagin 15. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Opið evni / vitnisburðir*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 9 (1-33)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*




### Sunnudagin 22. februar

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Bøn*
*Talari: Poul Guttesen*
Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Rómbrævið 10 (1-21)*
*Talari: Jógvan Zachariassen*




** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*